# Norðoya-tunnilin í lagi

Stóri knúturin í trætumálinum millum NCC og Vágatunnilin hevur eftir øllum at døma verið, hvussu krøvini til brunatrygdina skulu skiljast.

Semja er um, at norsku trygdarkrøvini skulu lúkast. Tey merkja millum annað, at eitt beton-lag á seks sentimetrar skal nýtast sum bjálving kring allan tunnilin.

Men seks sentimetrar eru ikki bara seks sentimetrar. Tað er nevnliga ymiskt, hvussu hetta krav verður ásett, og tað er fyrst og fremst hetta, sum hevur skapt óvissuna við Vágatunlinum.

Brunaumsjónin hevur ein tulking, sum sigur, at seks sentimetrar merkir, at lagið ongan tíð skal vera tynri enn seks sentimetrar. Punktum.

Ein onnur tulking er, at beton-lagið skal vera í miðal seks sentimetrar. Tá kunnu frávik niður í fimm sentimetrar góðtakast, samstundis sum tjúkd omanfyri níggju sentimetrar ikki verður roknað við í miðaltalinum.

Eftir øllum at døma hevur tað verið hetta seinasta, sum varð nýtt, tá Vágatunnilin varð gjørdur, og tað samsvaraði so ikki við fatanina hjá Brunaumsjónini.

Fyri at hetta ikki skal endurtaka seg við Norðoyatunlinum, er greitt avtalað, hvussu arbeiðið verður gjørt her. Her eru sonevndir njósnarar festir í tunnilin, áðrenn betonverjan verður sproytað. Njósnararnir eru seks sentimetra langir pinnar, og soleiðis skulu hesir vera undir í betoni, áðrenn tjúkdin er í lagi. Altso ein framferðarháttur, har arbeiðsfólki visuelt fær eftirkannað dygdina alt fyri eitt.

-mørk



*NCC er nú farið undir at styrkja um brunaverjuna í Vágatunlinum. Meðan arbeiðið verður gjørt, verður ferðslan gjøgnum tunnilin stongd ávísar tíðir*

# Styrkja vágatunnilin

**NCC er nú farið undir arbeiðið at umvæla um styrkja 900 fermetrar av brunaverjuni í Vágatunlinum. Partvíst verður arbeiðið gjørt sum garanti-umvæling**

VÁGATUNNILIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Økið, sum talan er um, er hitt sama, sum Brunaumsjónin mest sum alt fyri eitt staðfesti, ikki lýkur tey krøv, sum verða sett til brunaverjur í tunlum. Tað vil siga, at beton-lagið, sum er lagt her, er tynri enn tað, sum føroysku reglurnar áseta.

Í tíðindaskrivi hevur P/F Vágatunnilin boðað frá, at arbeiðið fer fram eftir einari ætlan, ið Landsverk hevur lagt. Henda ætlan er grundað á eina kanning og uppskot, ið altjóða ráðgevandi fyritøkan COWI hevur gjørt. Byggifyritøkan NCC, ið stóð fyri arbeiðinum at gera Vágatunnilin, ger eisini umvælingararbeiðið, sum byrjaði mánakvøldið 6. februar.

Í stuttum ber arbeiðið í sær, at Landsverk merkir upp í tunlinum, har bjálvingin skal styrkjast. Hetta arbeiðið er byrjað. Síðani setur NCC sonevndar njósnarar inn í veggin. Hetta er eitt slag av naglum, ið hava til endamáls at vísa, hvussu tjúkt betonglag skal leggjast uttaná verandi betonglag. Eftir, at Landsverk hevur góðkent hesar, sprænir NCC betong á veggirnar, og tað arbeiðið byrjar uml. 20. februar.

Tað er NCC, sum stendur fyri arbeiðinum at spræna beton á teir íalt 900 fermetrarnar, sum eru avmerktir. Hetta er sama fyritøka, sum stóð fyri gerð av tunlinum.

Spurdur, hvørt arbeiðið, sum tá varð gjørt, ikki varð gjørt nóg væl, tykist Dávur Reinert Hansen, stjóri í Vágatunlinum, ikki hava hug at gera nakrar beinleiðis viðmerkingar. Sjálvur segði hann tó, tá trætumálið byrjaði, at talan kundi gerast um endurgjaldskrav, og spurdur um hetta sigur hann, at partarnir eru komnir ásamt um, hvussu kostnaðurin skal býtast, og arbeiðið partvíst verður roknað sum garantiarbeiði.

Vil tað siga, at arbeiðið ikki var nóg gott frágingið?

– Tað vil eg ikki siga. Men alla ta tíð, at arbeiðið ikki er endaliga liðugt, kann talan jú vera um manglar so ella so, sigur hann.

Hann leggur tó dent á, at talan ikki er um nakra velduga upphædd, sum við hesum verður løgd omaná Vágatunnilin. Alt í alr er arbeiðið kostnaðarmett til nakrar hundraðtúsund krónur.

# Yvirskot á 15,2 mió krónur

**Kaupthing Virðisbrævameklarafelag hevði eitt rættiliga gott úrslit í fjør**

Avlopið á 15,2 mió kr. er tríggjar ferðir størri enn úrslitið fyri 2004. Rentingin av eginpeninginum er áðrenn skatt 64,2 prosent. Samlaði eginpeningurin er nú 29,8 mió kr.

Betraða úrslitið stavar serliga frá einum øktum umsetningi. Talan var nærum um eina tvífaldan av umsetninginum í fjør, sum eisini var eitt sera hendingaríkt ár fyri felagið.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at talan er um økt virksemi á øllum økjum.

»Handil og ráðgeving við virðisbrøvum hevur verið fyri stórari menning, og innan vinnutænastur hevur Kaupthing luttikið í størri vinnulívsfíggingum og í størri ráðgevingaruppgávum í sambandi við keyp og sølu av fyritøkum í Føroyum og uttanlands.

Føroyski fíggjarmarknaðurin er fyri stórum broytingum. Greiðar ábendingar eru um, at áhugin fyri virðisbrøvum bara økist, eins og keyp og søla av óskrásettum føroyskum fyritøkum er í stórum vøkstri. Hetta kemur virkseminum hjá Kaupthing til góðar«, verður millum annað sagt.

Víst verður annars á ætlaðu fríhandilsavtaluna millum Føroyar og Ísland og teir møguleikar, sum hendan ber við sær fyri Kaupthing. Tá avtalan kemur í gildi, verður virksemið hjá Kaupthing umskipað til eisini at fevna um bankavirksemi. Fyrireikingarnar til hetta hava verið í gongd í eina tíð, og í februar mánaði flytir virksemið hjá felagnum í nýggj høli í Bókbindaragøtu í Havn.

# Øll skulu halda lógina

**– Eisini myndugleikarnir, staðfestir Petur Lava Olsen, stjóri á Brunaumsjón landsins**

VÁGATUNNILIN
*Jákup Mørk*

Tað vakti ans, tá leiðarin á Brunaumsjónini fyri opnum skíggja staðfesti, at varð brunatrygdin í Vágatunlinum ikki fingin í rættlag, so sóu tey seg noydd at steingja tunnilin.

Tá alt kom til alt, so gjørdist ikki neyðugt við somikið víttfevnandi stigum. Soleiðis sendi Vágatunnilin í gjár út tíðindaskriv, har boðað varð frá, at brunaverjan í tunlinum nú verður styrkt á nøkrum økju.

– Tað er kanska rætt, at eg meldaði nóg so kraftigt út at byrja við. Í øllum førum var okkara sannføring, at ávísir manglar vóru í hesum, og at tunnilin tí ikki leyk krøvini til brunatrygdina, sigur Petur.

Hann greiður frá, at seinastu tíðina er eitt umfatandi kanningararbeiðið gjørt, har hundraðtals hol eru borað, soleiðis møguligir manglar kunnu staðfestast.

– Landsverk hevur staðið fyri hesum kanningararbeiðinum, og nú er so avmerkt, hvar betonverjan er ov tunn. Her skal nýtt lag av beton so sproytast omanyvir, og tá vóna vit so, at hetta er í lagi.

Lýkur Vágatunnilin so øll brunakrøvini, tá hetta arbeiðið er gjørt?

– Ja, tað skuldi hann gjørt. Og tað skal hann eisini. Lógirnar eru jú til, fyri at øll skulu halda tær. Eisini myndugleikarnir, sigur Petur Lava Olsen at enda.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!